# Maibritt fyllir norsku bløðini

**Eisini í Noreg hava tey søguna um flogternuna Maibritt sum høvuðssøgu**

FLOGVANLUKKA
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Eins og í føroyskum miðlum hevur flogvanlukkan í Stord fylgt nógv í norsku fjølmiðlunum.

Í Føroyum eru vit øll ógvuliga upptikin av, hvat hendir í Noreg og, hvat nýtt kemur undan kavi rundan um vanlukkuna men í Noreg eru tey sanniliga eisini áhugað í, hvat hendir í Føroyum, nú talan var um eitt føroyskt flogfar.




### Samband og kontaktir

Fyri at fáa sum mest burturúr og best møguligar upplýsingar og myndir, er tí týdningarmikið at hava samband og fáa kontaktir á staðnum har tað hendir. Tí valdi Sosialurin at ganga saman við norsk bløð, og soleiðis bar til at fáa myndir frá vanlukkustaðnum, fáa fakta og upplýsingar og síðani borðreiða hetta fyri okkara lesarum.

Hinvegin eru norsku miðlarnir eisini altráaðir eftir at fáa upplýsingar og myndir úr Føroyum, og tað hava teir eisini fingið alla tíðina. Hetta sæst millum annað aftur í, at myndin av Maibritt Magnussen og søgan um hana, sum í gjár var á forsíðuna á Sosialinum, í dag eisini er høvuðssøga í fleiri norskum bløðum.

"Maibritt ble helt i flydramaet" skrivar VG, sum hevur Maibritt sum forsíðusøgu. "Helten fra flammehavet" skrivar Bergens Avis, sum somuleiðis hevur Maibritt sum høvuðssøgu, men eisini onnur bløð, sum Bergens Tidende og Aftenposten hava givið søguni nógv pláss á teirra síðum, og søgan í Sosialinum í gjár verður endurgivin.

Hetta er eitt ógvuliga gott dømi um, hvussu týdningarmikið tað er, at alliera seg við aðrar miðlar og lata upplýsingar og myndir sína millum, soleiðis at lesarin fær ta bestu søguna.







# Maibritt eigur æruna

**Maibritt gjørdi alt rætt og hevur gjørt eitt megnar arbeiði. Tað siga tey, sum sluppu úr flogfarinum og nú liggja á Haukeland Sjúkrahús**

FLOGVANLUKKA
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Við Sosialin í gjár greiddi mamma Maibritt, Greta Magnussen frá, hvussu dóttir hennara hevði bjargað níggju monnum í brennandi flogfarinum. Tá segði hon millum annað, at Maibritt var ein sonn hetja.

Hesum taka eisini fleiri av teimum bjargaðu undir við, og norska blaðið Bergens Tidende hevur prátað við onkran teirra, sum yvirlivdu.

– Hon var kvik, tá hon opnaði neyðútgongina, hetta tá vit onkur annar hevði roynt at opnað tvær aðrar neyðútdyr. Sanniliga kunnu vit takka henni fyri, at vit eru á lívi. Hon gjørdi alt rætt, sigur 34 ára gamli Kenneth Palmer, sum slapp livandi frá vanlukkuni.



*Maibritt í flogfarinum, tá hon skuldi til námsferð við gamla studentaflokki sínum fyri tveimum árum síðani.*

Eisini hevur blaðið fingið prát við August Bakke, sum er klinikkstjóri á kirurgisku deild á Haukeland Sjúkrahús.

– Sjúklingarnir siga, at hon hevur gjørt eitt megnararbeiði og tað hava tey biðið heilsustarvsfólkini sagt við hana, greiðir hann frá.

### Aker Kværner takkað Maibritt

Norska blaðið VG veit eisini at siga, at umboð frá leiðsluni hjá Aker Kværner Elektro, hava vitjað Maibritt á sjúkrahúsinum og takkað henni fyri avrikið.

Og aðrir norskir miðlar endurgeva Åge Aadland, fakleiðara hjá sløkkiliðnum í Stord, sum hevur sagt soleiðis um 21 ára gomlu Maibritt Magnussen úr Oyndarfirði:

– Flogternan (Maibritt, blðm.) gjørdi eitt megnar arbeiði við at skipa evakueringina, men eg eri eisini sannførdur um, at sløkkiliðið á flogvøllinum bjargaði onkrum lívum.



## Liggja enn á sjúkrahúsi

**Fleiri av teimum, sum vóru í vanlukkuflogfarinum, liggja enn á sjúkrahúsi.**

*Arni Joensen*

Tveir av monnunum eru nú fluttir av Haukelandsjúkrahúsinum til plastskurðdeildina á universitetssjúkrahúsinum í Stavanger. Teir eru 48 og 62 ára gamlir. Har hevur ein 39 ára gamal maður ligið síðani vanlukkuna, men hann verður útskrivaður í dag.

Tríggir menn, sum eru ávikavist 28, 34 og 48 ár, liggja framvegis á Haukeland-sjúkrahúsinum, har teir fáa viðgerð fyri brunasár.

Fýra mans vórðu upprunaliga fluttir á sjúkrahúsið á Stord, men teir høvdu ikki fingið so stóran skaða, og teir eru útskrivaðir. Ein teirra hevur kortini fingið so stórar sálarligar trupulleikar av vanlukkuni, at hann fær framvegis viðgerð, skrivar Aftenbladet.

no